







## Ólavsøkurøðan hjá Hans Petur í Brekkunum

# »Eg má sum havnarmaður syngja, Á tann deiliga Keypmannahavn«

Góðu føroyingar, góðu ólavsøkugestir!

Hjartaliga vælkomin á ólavsøku á Norduratlantsbryggjuni í Keypmannahavn. Oyrahangarin hjá Kára Jacobsen og Elin Heinisen sigur, Á tann deiliga Havn, men í dag má eg sum havnarmaður syngja, Á tann deiliga Keypmannahavn.

Ólavsøkan hevur eitt serligt pláss í hjørtunum hjá føroyingum, og tískil halda vit Ólavsøku hvørt ár, eisini her í Danamark.

Vit halda Ólavsøku fyri at minnast norska kongin, Ólav hin heilaga, sum doyði á Stiklastøðum í árinum 1030. Ólavur var kongur í Noregi í árunum 1015-1028. Hann var kristin maður, og tá hevði kongur ein avgerandi lut í politikki.

Sjálvt um tíðin er vorðin, sum hon er, og kongur og kirkja ongan avgerðandi lut hava í politikki longur, ber ólavsøkan tó brá av einari samanrenning av politikki og kristindómi, sum eisini eyðkenna





